## DAGSINS MEINING

# Landið er forsømt

Um hugt verður at, hvat flokkarnir, ið myndaðu undanfarnu samgongu, lova til valið, so fæst ein váttan uppá júst tað, ið andstøðan hevur ført fram øll árini. Tað sæst týðiliga, at man hevur forsømt at viðlíkahildið grundleggjandi vælferðarsamfelagið, meðan meginparturin av orkuni hevur verið nýtt til ein blindan veg í sjálvstýrismálinum og ikki at forgloyma destruktivt klandur.

Tað er heilt burtur úr vón og viti, at almennar tænastur til borgaran, ið hava riggað fínt í meir enn 30 ár, skulu verða skerdar í allarbestu tíðum, samstundis sum borgarin betalir meir enn nakrantíð í skatti fyri hesar skerdu tænastur. Alt hetta meðan umsitingin er vaksin púra ótálmað. Hetta vátta bæði Fòlkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin við sínum valskráum. Hví hesir flokkar so einki hava gjørt við málið í tey næstan seks árini, teir hava rátt fyri borgum, verður einki sagt um í valstríði teirra.

Tjóðveldisflokkurin dámar væl at visa á, hvussu nógvar milliónur verða brúktar meir til hetta og hatta innan almannaøkið. Hetta ger bert skommina størri. Ikki nokk við, at almennu grundtænasturnar, ið hava verið ein rættur í meir enn 30 ár, verða skerdar innan hetta økið. Skattgjaldarin betalir eisini meir enn nakrantíð fyri hesar skerdu tænastur og hesar nýstovnaðu bíðilistarnar inn heimarøktina. Man hevur megnað tað heilt ótrúliga at reypa av at fingið minni fyri meir.

Desentralisering og raðfesting verða lyklaorðini hjá teimum, ið taka við eftir frárandi samgongu.

Í valstríðnum og í fjølmiðlum hevur verið tosað um meirkostnað í samband við vallyftini um at fáa almennu tænasturnar betri. Tosað verður nógv um, hvar peningurin skal koma frá.

Tað er ikki vist, at talan er um meirkostnað í øllum førum. Um talan skal verða um reinan meirkostnað, so verður ókritiskt gingið útfrá, at hvør króna verður rætt brúkt sum er, og tað er sera ivasamt.

Í svárastu kreppu, ið Føroya land hevur sæð síðani fimmtiárini, megnaðu táverandi samgonga, hóast fíggjarligt ódnarveður, at halda heimarøktarskipanina heila, hóast nógv stóð á. Hetta hevur fráfarandi samgonga ikki megnað í bestu tíðum, og tí má sigast, at hon er dumpað í vælferðarpolitikki.

Tann dagin, at ábyrgdarfullir flokkar spara í rættindunum hjá teimum, ið hava bygt hetta land, og nú skulu hava tað gott á ellisárum, tá er deyðin í durinum. Hetta gjørdi undanfarna samgonga við ábyrgdarleysari raðfesting. Komandi val er eitt val millum hetta og at eindurreisa tað, ið er brotið niður seinastu tvey valskeiðini.

**Sosialurin**

## VALGREINAR

# Ein Vinkona

**Dan R Petersen**
*javnaðarmaður*



Eg var og vitjaði eina eldri vinkonu. Hon klárar seg sjálva við heimarøkt. Hóast tað var út móti middegi, hevði hon lagt seg aftur, tí heimahjálpin, sum skuldi hjálpa henni í klæðini, var ikki komin.

"Neyðars heimahjálpir, tær renna og tuska allan dagin, og klára ikki at halda tíðina.Tær hava alt ov nógv at gera. Men tað var gott, at henda ólukku samgonga var send til hús."

Eg var samdur við hana, og innantanna var eg í øðini inn á støðuna. Samgongan hevur víst eina sanna kynismu á hesum økinum. Í bestu tíðum í søguni skerdu teir reingerðina og søgdu heimahjálpum upp.

Javnaðarflokkurin vil styrkja heimarøktina.

# Skilagóður búskaparpolitikkur

**Álvur Kirke**
*Valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Í seinastuni hava vit hoyrt menn, sum skil hava fyri slíkum, sagt, at vit kunnu vænta afturgongd í búskapinum. Sannleikin er tann, at tað ber snøgt sagt ikki til, at hava ein javnan búskaparvøkstur ár eftir ár. Fyrr ella seinni vendir.

Tá Ísael var í Egyptalandi, hevði Farao ein dreym, sum Jósef týddi. Dreymurin segði, at eftir sjey ár við yvirflóð, fóru at koma sjey hungursár. Hetta er tað, sum búskaparfrøðingar kalla sveiggj í búskapinum. Sagt verður, at vit ikki skulu rokna við nakrari kreppu, men afturgongd. Talan verður sostatt ikki um hungur og hall.

Í fyrstu Mósebók 41, 29-31 stendur, at Jósef segði við Farao: "Tað koma sjey ár við stórari yvirflóð um alt Egyptaland. Men aftan á tey koma sjey hungursár, so at øll tann yvirflóð skal verða gloymd í Egyptalandi, og hungurin skal arma landið út. Eingin skal minnast yvirflóðina, ið var í landinum, fyri hungrinum aftaná; tí hann skal verða ógvuliga svárur".

Og so gav Jósef Farao hesi ráð (33-36): "Nú skuldi Farao valt sær ein skilagóðan og vísan mann og sett hann yvir Egyptaland. Tað skuldi Farao gjørt, og so sett umsjónarmenn yvir landið og tikið fimtingin av grøðini í Egyptalandi, tey sjey árini ið yvirflóðin verður. Teir skulu, hesi góðu árini ið koma, savna alt, ið kann duga til føði, og dunga saman korn til føði í býunum - sum ogn Faraos - og ansa eftir tí. Kornið skal so vera til at taka hjá landinum tey sjey hungursárini, ið koma skulu á Egyptaland, so at landið skal ikki ganga til grundar av hungrinum."

Vit eiga at læra av hesum, og goyma nakað, tá vit hava ár við yvirflóð, til verri tíðir. Tann, sum roknar við vaksandi búskapi ár eftir ár, roknar skeivt. Vit fara altíð at hava góð ár og minni góð ár. Kanska ikki altíð sjey og sjey, men tað er vert at leggja sær í geyma, at hetta er ein náttúrulóg, at tað gongur upp og niður. Tí er tað neyðugt, at goyma nakað av vinninginum til tey vánaligu árini, sum koma. Gera vit ikki tað, hava vit einki at standa ímóti við.

Miðflokkurin fer at gera sítt til, at soleiðis verður gjørt.

Miðflokkurin vil reka ein skilagóðan búskaparpolitikk.

Vel tí Miðflokkin.

# Tórshavnar kommuna hevur bjóðað seg fram til at hava uppvenjingarstovu

**Elin Lindenskov**
*valevni Javnaðarflokkurin*
*www.lindenskov.com*



Valsendingin í sjónvarpinum í kvøld, úr Vága valdømi, kom nógv inn á eldraøki. Umboðið hjá Tjóðveldisflokkinum lovaði økisterapi, til teirra sum mist hava førleika, soleiðis at tey kunnu fáa møguleika at vinna førleikan aftur, og harvið liva eitt vanlig lív, í egnum heimi. Hetta skuldi minka um tørvin á heimahjálp, ella røktarheimsplássum.

Hetta ljóðar væl. Men hvussu ber tað til, at landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum noktaði Tórshavnar kommunu fígging, til eina uppvenjingarstovu, sum hevði sama endamál sum økisterapiin. Ætlaða uppvenjingarstovan, sum Tórshavnar kommuna arbeiddi við, skuldi skipast við eini ergo- og fysioterapi, har sjúklingar skuldu kunna búgva í longri tíð, meðan tey fingu uppvenjing aftaná sjúkraviðgerð. Eisini var hon ætlað fólkið, sum ikki kundu fara heim av sjúkrahúsið beinanvegin, t.d. tí broytingar skulu gerast í heiminum.

Ætlaða uppvenjingarstovan er fyribils slept, tí landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum ikki vildi játta fígging. Hetta hóast kommunan hevur keypt hús til m.a. hetta endamálið. Vilt tú vita meira um hvat eg tikist við seinastu 4 árini, so vitja mína heimasíðu www.lindenskov.com. Har liggja 100 tals greinar, røður o.a. frá hesum tíðarskeiði.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Ov lítil saft í c-vitaminum John Johannessens

**Sunleif Rasmussen**
*Tónaskald og formaður i Musikklærarafelagnum*



Undir yvirskriftini Gev tónleikinum c-vitaminir gevur vælevni Javnaðarfloksins John Johannessen síni tónleikapolitisku sjónarmið til kennar.

Lat tað vera sagt beinanvegin, at her er soðið alt ov tunt, og man hetta tónleikapolitiska útspæli vera eindømi á okkara leiðum. Tað er í hvussu er sera sjáldan at ein sær politikkarar, ella vónarpolitikkarar, í grannalondum okkara koma við uppskoti um almennan stuðul til karioki-sangarar og døgnflugutónleik. Men ein skal helst síggja hetta vallyfti sum eina lættkeypta roynd at tekkjast ávísum veljaraskara.

Um ein hevur pening (nógvan pening) kann ein lættliga gerast "heimskendur" sangari. Tað eru óteljandi dømi um talentleysar, fitnesstrimmaðar, solariubrúnar sokallaðar sangarar, ið eru "heimskend". Men fyri at hetta kann lata seg gera, má peningaupphædd, ið svarar til alla ta føroysku fíggjarlógina til.

Popptónleikur er ein vøra, ið skal seljast, og fyri at selja nógv av einari vøru skal hon marknaðarførast væl. Og John Johannessen skuldi verið ein tann fyrsti at vita, at góð marknaðarføring kostar nógvan pening.

Øll vita vit at Cola ikki er tað sunnasta vit kunnu borðreiða við. Men, við kostnaðarmiklari, dugnaligari marknaðarføring, hevur tað eydnast Cola at gerast tann mest nýtti drykkurin í heiminum. Soleiðis er eisini við populerum døgnflugutónleiki. Við dugnaligari, sera kostnaðarmiklari marknaðarføring hevur hesin listarliga grunni tónleikur vunni sær eitt stórt pláss í almenna rúminum.

Vóni inniliga at hetta er eitt mentanarligt síðuspor í valstríðið javnaðarfloksins.

Havi sagt tað so ofta fyrr og endurtaki einaferð enn; endamálið má ikki vera at fólk skulu gerast "heimskend". Her er marknaðarføring í hásæti og ikki skapandi listin. Endamálið má vera at geva teimum ungu so góða tónleikaliga útbúgving (førning) sum gjørligt. Á henda hátt fáa vit veruliga listarliga virðing úti í heimi, og royndir hava víst, at tað longsta stráið verður drigið við drúgvari listarligari menning. Okkum nýtist bert at hugsa um listarfólk sum William Heinesen, Ingálvur av Reyni og onnur. Er dygdin góð nokk, skal heimurin uttan iva fáa eygað á listarligu evni føroyinga.

Munagóðan stuðul til tónlistarliga menning og harvið dygd, heldur enn døgnflugukendan løtuvinning!

Lat tað vera almenna tónleikapolitikkin hjá øllum politisku flokkunum. Eisini Javnaðarflokkinum!

Við tónlistakvøðu!

# Góði Suðringur

**Jón Guttesen**
*Tvøroyri*

Tó at eg, sum flest onnur, havi eina politiska støðu, so hevur hetta lesarabrævið ikki til endamáls at vinna einum flokki frama fram um hinar, men heldur ein áheitan til suðringar allar um at halda okkara valevnum føstum í einum stevnumiði framum onnur.

Nú val er í hondum og føgru lyftini ei kenna mørk vil eg bara staðfesta hetta. Um okkara komandi fólkavaldu í valøkinum standa saman, so hevur Suðuroyggin vunnið ein sigur, óansæð hvørjir flokkar fáa umboðan á tingi.

Tað skal verða fremsta uppgávan hjá okkara komandi fólkavaldu at umboða alla oynna, at savna alla oynna og at vinna allari oynni frama á tingi. Tí tá ró verður í hvør sína ætt kemur báturin ongan veg.

Ábyrgdin liggur tí á okkara herðum, okkum sum búðleikast á hesari føgru oyggj, okkum hvørs lagna tingfólksins nú hvílir. At krevja av okkara komndi umboðum at tey fremja okkara søk, søk Suðuroynna, eftir at vit hava sínt teimum tað álit, og tann heiður, at velja tey at umboða okkum í landsins mætastu høll.

Eru avbjóðingarnar og uppgávurnar stórar fyri Føroya land, so eru tær tvífalt stórar fyri Suðuroynna. Tí kann klandur og kykl ikki eiga nakran góðan í tí liði sum skal umboða oynna. Kostinir, góði suðringur, eru tvinnir - og annar er ikki bara mjúkur, men alneyðugur. Standi saman ella felli hvør sær.

# Valstríð í InternetSosialinum

**Sosialurin hevur gjørt serliga valheimasíðu við yvirliti yvir øll valevnini, og har øll valevni kunnu kunnu greiða frá sær sjálvum og sínum sjónarmiðum**

LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




*Á www.sosialurin.fo ber til at fylgja við valstríðnum uttan at vera haldari av InternetSosianum. Har ber til hjá valevnum at greiða frá sær sjálvum, sínum sjónarmiðum og at savna allar valgreinarnar*

Nú ber til at fylgja við valstríðinum á internetinum. Sosialurin hevur gjørt eina serliga valheimasíðu, sum verður dagførd loypandi gjøgnum dagin og í vikuskiftum, og har øll kunnu lesa uttan at vera haldari.

Sum vera man eru nógvar valgreinar í blaðnum nú um dagarnar, men fyri betur at kunna halda skil á, hava vit gjørt eina seraliga síðu á InternetSosialinum, har til ber at fáa eitt sindur at vita um valevnini, yvirlit yvir øll, ið eru uppstillað – og so hava øll valevnini eisini høvi at fáa allar sínar valgreinar lagdar har eins og link til egnar heimasíður.

Sum við seinasta val taka bløðini pengar fyri valtilfar frá tí, at uppstillingarlistarnir eru latnir inn. Valheimasíðan hevur verið tøk síðani vikuskiftið, og hava rættuliga nógvar vitjanir verið á síðuni – seinasta samdøgrið táttaði í 7.000 vitjanir.

Síðan sæst á www.sosialurin.fo

# Àheitan til suðringar til komandi løgtingsval

**Petur Johannessen**

Undirritaði skal bert gera vart við nøkur fundamental ting, ið veljarin eigur at hava í huga, nú man aftur skal til at taka støðu til hvørt valevni er best skikað til at koma á løgting.

Eg havi í nógv ár í samband við mítt fyrrverandi starv »stjóri á PALM Seafood P/F« heitt á tingmenninar í Vági um at gera nakað munagott við flutningsstuðulin til og frá oynni, tí tað er alt avgerandi fyri, um vit skulu kunnu yvirliva ella ikki, men til fánítis, uttan undantak.

Neyvan hevur nøkur bygd eftur fólkatalinum verið so væl umboðað á tingi sum Vágur hevur verið nógv tey seinastu árini, og neyvan hevur spurts so lítið burturúr, man kann bara hyggja eftir Vági, sum er í svárari kreppu, stórt arbeiðsloysi.

Orsakað av at flutningurin er so kostnaðarmikil til og frá Suðuroynni hava tingmennirnir í Suðuroyar sunnari helvt óbeinleiðis avgjørt at fiskaídnaður og annað virksemi sum heild, sum krevur flutning til og frá oynni ikki í longdini kann verða í oynni, ella sagt við øðrum orðum, ongar íløgur verða gjørdar í oynni í framtíðini, tí tað er bíligari at gera hetta norðanfjørðs, tað er ikki títtleikin á túratalinum tjá Smyrli, sum er avgerandi men kostnaðurin.

Tað eigur at verða sett trýst á tingmennirnir frá lokalbefólkninginum og lokalfeløgunum at tingmennirnir skulu arbeiða saman »tað hava teir ikki gjørt« soleiðis at nøkur ítøkilig úrslit spyrjast burturúr, uttan mun til hvør er í tinganesi og hvønn flokk teir hoyra til, og tikið skal verða saman um minst einaferð um árið ella eftur tørvi, um gerðir er aftan fyri orðini, ella vallyftini eru hildin, so tann siðvenjan ella líkasælan, sum er galdandi og hevur verið alt for leingi verður tileinkisgjørd, nú má okkurt gerast.

Eg sigi hetta, tí eg meti, at ein bygd sum Vágur ikki hevur lív lagað, um ikki kappingarstøðan við restina av landinum verður tann sama, hvør fer at at gera íløgur her, tá avkastið er munandi størri norðanfjørðs, so her burdi verði eitt felagsmál so at siga hjá øllum Suðringum at greiða, so vónandi fara allir tingmenn í Suðuroyarvaldømi at standa saman um oynna og gera sína skyldu og ikki bara ganga í Havn púra anonymir, men syrgja fyri at korini hjá vinnulívinum í oynni verða tey somu sum aðrastani, ella um niðurstøðan verður at tað ikki er meiriluti fyri at farmakostnaðurin við Smyrli verður útjavnaður so hava tingfólkini skildu at siga frá í góðari tíð so suðringar vita, hvat er í væntu, tí so er bert spurningur um tíð nær einki privat vinnulív er eftur í oynni, og restina kann man hugsa sær til.

Tí er tað avgerandi at fáa boðað frá til tey fólk sum bjóða seg at umboða Suðuroynna at antin gera tit nakað, ið munar, ella fær tað fylgir, vit suðringar kunnu ikki sita og hyggja at meðan restin av landinum fær betur fortreytirat arbeiða og virka undir, (undirsjóvar tunlar) og vit sakka bara meiri og meiri afturúr.

Einaferð enn skal er undirstrika, at tað er kostnaðurin til og frá Suðuroy, sum er so ovurhonds høgur, og ikki túratalið (títtleikin), sum er avgerandi hjá vinnulívinum.

Sjálvandi er tað bara gott við fleiri túrum um dagin, og er tað ein sjálvfylgja, at ferafólk úr suðuroy ikki mugu ganga heilan dag í Havn, men at siglt verður minst tvær ferðir, tað skuldi bara mangla, men tað er kostnaðurin, sum er alt avgerandi, fyri vinnulívið.

Gott val.